| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 25. juni 2009 |
| Býráðsfundur nr. | 07/2009 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2009 tann 25. juni kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 19. juni 2009 um innkalling til fundar.

**<u>Møtt vórðu:</u>**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonnni á Horni

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**<u>Mál nr. 35/2009.</u>**

**2. viðgerð av endurskoðaðari fíggjarætlan kommununar fyri 2009**

Ásannandi, at skattainntøkan fyri 4 teir fyrstu mánaðarnar í 2009 ikki svarar til tað inntøkugrundarlag, sum samtykta fíggjarætlan kommununar er grundað á, leggur fíggjarnevndin viðløgdu broyttu fíggjarætlan fyri býráðið til góðkenningar.

Broytta fíggjarætlanin sæst í høgru spaltu í viðløgdu fíggjarætlan fyri 2009, har upprunaætlanin sæst í vinstru spaltu.

Fíggjarnevndin hevur broytt skattagrundarlagið fyri A og B skatt úr kr. 253.725.399 í kr. í kr. 233.000.000 soleiðis, at væntaði kommunuskatturin av A og B skattainntøkum verður lækkaður við kr. 4.455.961, frá kr. 44.220.586 til kr. 39.764.626.

Fíggjarætlanin javnvigar nú við kr. 75.211.558 móti kr. 81.448.618 í uppruna ætlanini.

Fíggjarnevndin hevur eisini í samráð við hinar politisku nevndirnar gjøgnumgingið fíggjarætlanina post fyri post og gjørt sparingar í íløgum og rakstri á nærum øllum økjum. Tó eru onkrar kontur hækkaðar og onkrar inntøkukontur eru lækkaðar, sí viðlagda skjal har broytingarnar framganga.

Býráðsleiðslan hevur havt fund við allar stovnsleiðarnar í kommununi, har kunnað varð um ætlaðu broytingarnar. Heitt varð somuleiðis á leiðarnar um at koma við møguligum innanhýsis sparingum. Upplýst varð eisini um gongdina í samfelagnum sum heild og hvussu meint hon rakar kommunalu skattainntøkuna.

Soleiðis fingu øll boð um at spara har tað bar til.

Hjálagda fíggjarætlan við fylgiskjali er viðgjørd á fundi í fíggjarnevndini tann 07. og 28. mei 2009 og mælir nevndin býráðnum til at samtykkja málið.

Á býráðsfundi tann 04. juni 2009 varð samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini. (9-0) við viðmerking frá býráðslimi í gerðabókina um hennara støðu fyri at atkvøða fyri málinum.

Sambært upplýsningum frá Fíggjarmálaráðnum skal endurskoðaða fíggjarætlanin fyri kommununa hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili. Her verður víst til, at ætlanin má metast sum ein eykajáttan – bæði + og -).

Tí skal býráðið hava ein 2. viðgerð av málinum.

Hinvegin verður umsitingarliga mett, at sambært kommunustýrislógini skal uppskot til fíggjarætlan fyri kommununa hava 2 viðgerðir og eykajáttan somuleiðis 2 við í minsta lagi 14 daga millumbili, meðan einki sum helst stendur um endurskoðaðar ætlanir og heldur ikki um lækkan av ætlanum. Tí hevur endurskoðaða ætlanin bert fingið 1 viðgerð, nevniliga á fundinum 04. juni 2009.

Men tá ið kommunala eftirlitið á økinum krevur 2 viðgerðir, so verður neyðugt at hava eina 2. viðgerð við 14 daga millumbili.

**Avgerð:**
Samtykt varð við 2. og endaligu viðgerð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna broyttu fíggjarætlanina fyri kommununa fyri 2009. (9-0).

**Mál nr. 36/2009.**

**Parkeringspláss við Bjarnaveg og Torkilskrók**
Í samband við stórar parkeringstrupulleikar á Bjarnavegi og Torkilskróki er gjørt uppskot til parkeringspláss á økinum millum hesar vegir.

Tekniska nevndin heldur at tørvurin á bilstøðlum í Toftabønum er so mikið stórur, at neyðugt er við bilstøðlum niðan frá Bjarnavegi og framvið niðaru vegsíðuá Torkilskróki, hettr sum umleið sum sýnt á hjáløgdu tekning uppskot I.
Uppskot II umfatar bilstøðlar inn frá Bjarnavegi.
Uppskot III umfatar bilstøðlar oman frá Torkilskróki .

Tá ið Frits Johannesen arbeiðir við ætlan um eina barnalund í Fuglafirði og hevur fingið ávíst hetta økið at arbeiða víðari við, møtti hann eftir áheitan frá nevndini í samband við viðgerð av hesum máli.

Á fundi, nevndin hevði við Frits tann 19. mai 2009 um hetta mál, varð niðurstøðan tann, at hann varð sinnaður at tillaga ætlanina við bilstøðlum inn frá Bjaranvegi og framvið Torkilskróki samb. uppskot I.

Eftir nærri umhugsan seinni er Frits komin til ta niðurstøðu, at hann heldur tað er óheppið at hava bilstøðlar og barnalund so tætt saman og helt hann, at ikki verður pláss fyri hesum báðum á økinum.

Áðrenn fundin varð heitt á Frits at kunna seg um møguleikan at nýta økið millum Stovugerðisvegin og Innandalsveg frá Maxsahjalli og til íbindingina Innandalsvegur/ Stovugerði.
Hann hevur verið á staðnum og metir hetta økið verða væl egnað til ætlaðu barnalund.
Víddin á økinum við Innandalsveg/Stovugerði er umleið 1300 m2 og við Bjarnaveg/Torkilskrók umleið 850 m2, um eingi parkeringspláss verða gjørd.

Í endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri 2009 eru kr. 300.000,- settar av til bilstøðlar við Bjarnavegur/Torkilskrókur, og tí verður neyðugt at broyting í byggisamtyktini verður avgreidd sum skjótast, um partur av hesum arbeiði skal verða gjørt í 2009.

Sum nú er, er framløga og kærufreist 3 mánaðar frá kunngerðardegnum , afturat hesum er avgreiðslutíðin í Innlendismálaráðnum.

Tekniska nevndin mælir á fundi 15. juni 2009 býráðnum til, at óbygda øki millum Innandalsvegin og Stovugerðisvegin frá Maxsahjalli til íbindingina Innandalsvegur/Stovugerðisvegur verður nýtt til barnalund, og at økið framvið Torkilskróki og Bjarnavegi verður nýtt til bilstøðlar samb. uppskot I, og byggisamtyktin broytt soleiðis, at hetta í byggisamtyktini verður lagt út til vegøki.

**Avgerð:**
Broytingaruppskot frá Elisabeth Eldevig um at taka undir við uppskoti II, sum mett verður er bæði ein betur praktisk og fíggjarlig loysn á málinum í verandi støðu. Uppskotið fall. (2 atkv. fyri og 7 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Dánjal Vang, Jann Toftegaard, Eyðun á Lakjuni, Petur Abrahamsen, Magnus S. Midjord og Sonni á Horni). Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá teknisku nevndini og varð hetta samtykt. (7-2). Ímóti atkvøddu Eliasbeth D. Eldevig og Kristina Toftegaard Larsen).

**Mál nr. 37/2009.**

**Viðvíkjandi uppskoti til broytan av byggisamtyktini á Hellunum.**

Í sambandi við matrikulering av økinum til sparkivøllin á Hellunum hevur Umhvørvisstovan boðað frá, at samsvar skal verða millum ásetingarnar í byggisamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu umfatandi Hellurnar og viðurskiftini á staðnum.

Ein partur av økinum, sum sparkivøllurin liggur á, er fríilendi (øki I) og ein partur á øki til almennar stovnar (øki E). Økið E kann millum annað verða nýtt til spæliplláss.

Nevndin mælir á fundi 15- juni 2009 býráðnum til, at økið E á Hellunum verður víðkað sambært fyriliggjandi uppskoti frá teknisku deild.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 38/2009.**

**Broytan av redmarki fyri Fuglafjarðar havn.**

Í sambandi við at Faroe Bunkers arbeiðir við ætlan um bunkring av skipum, sum hava eina slíka stødd, at sleipiorka at fáa hesi til bryggju ikki er tøk í Føroyum, er ætlanin at bunkring fer fram úti á redini inni á deyðavatni við tangaskipi, sum verður stationerað í Fuglafirði.

Skipini, sum koma at bunkra á fjørðinum, hava eina longd upp á umleið 300 metrar.

Borgarstjórin og oljufeløgini hava verið á fundi við landsstýriskvinnuna í innlendismálum um hesi viðurskifti, og sambært hesum verður neyðugt, at tað í samband við tilbúgving er greitt, hvat ábyrgdarøkið hoyrir til Fuglafjarðar havn.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini 15. juni 2009, og mælir nevndin býráðnum til, at redmarkið verður flutt soleiðis, at hetta verður úr eini linju úr Heimarugjógv til norðanvert Kálvadal, hetta sambært hjáløgdu tekning.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá havnanevndini um at flyta redmarki úr eini linju úr Heimarugjógv til norðanvert Kálvadal, sum hjálagda kort sýnir, og at søkja Innlendismáláráðið um neyðugt loyvi, soleiðis at hetta kann verða lýst við kunngerð. (9-0).

**<u>Mál nr. 39/2009.</u>**

**Matstovuloyvi til Ítróttarhøllina á Kambsdali.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Politinum í Føroyum, dagfest 02. juni 2009, har biðið verður um ummæli til umsókn fra PrimaVera, Dalavegur 8, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, um matstovuloyvi til pizzaria í Ítróttarhøllini á Kambsdali.

Sambært umsóknini eru hølini annars góðkend ídag undir navninum Dagunn Nolsøe Larsen. Viðheft umsóknini eru tekningar, sum sýna:

- Hølini
- Frárensl og luftskifti
- Lýsing av reinhaldsætlan
- Matarskrá
- Vaskilista

Umsóknin er annars sent til ummælis hjá:
Heilsufrøðisligu starvsstovuni
Fuglafjarðar kommunu
Brunaumsjón landsins.

**Avgerð:**
Samtykt varð at mæla Politinum til, at matstovuloyvi verður veitt PrimaVera í cafeteria í Ítróttarhøllini á Kambsdali, tó treytað av góðkenning frá Heilsufrøðisligu starvsstovuni og Brunaumsjón landsins. ( 9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.30.

Dánjal Vang

Jann Tofetgaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen